## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini onkur sólglotti. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, um kvøldið minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fleyr til gul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 16 stig.

# Vandamikil krossur

**Á vegkrossinum Grønlandsvegur–Jóannes Paturssonargøta hava nógv ferðsluóhapp verið. Bæði við og uttan fólkaskaða. Bara í juli mánað í ár vóru trý óhapp á staðnum**

FERÐSLA
*Edvard Joensen*




*Myndamaður: Jens Kristian Vang*



Vegkrossurin Grønlandsvegur–Jóannes Paturssonargøta tykist vandamikið vegastrekki at koyra á. Í øllum førum um farast skal eftir títtleikanum av óhappum, sum henda har á staðnum.

Fólk, sum búgva niðalaga við Grønlandsvegin í Havn, vita frá nógvum hendingum at siga, har bilar hava stoytt saman, og fólk eisini hava fingið skaða ella skelk. Bara í juli mánað í ár hava ikki færri enn trý ferðsluóhapp verið á staðnum. Í hvussu er í tí eina førinum hendi fólkaskaði.

Fólk, sum búgva í grannalagnum vita at greiða frá, at tað ofta eru bilar, sum koma oman eftir Grønlandsvegnum, ið koyra út á Jóannesar Paturssonargøtu og sostatt gerast atvoldin til óhappini.

Tey halda, at ein grund kann vera, at fólk halda vegastrekkð vera ein vanligan krossveg, og at tey, sum koma út eftir Joannes Paturssonargøtu, eiga at halda av fyri ferðslu frá høgru.

Men tey, sum halda soleiðis, hava misskilt eitthvørt, tí ferðsluskelti stendur við Grønlandsvegin, sum sigur teimum frá, at har skal haldast av.

So eisini á hesum vegastrekkinum, eins og mangan er vanligt yvirhøvur, eru tað menniskjansligar atvoldir til flestu óhappini.

Stutt og greitt tí at fólk hyggja seg ikki nóg væl fyri, ella í øðrum lagi virða ikki nóg væl ta uppmerking, sum er. Ella kanska bara tað, at tey hava gloymt, hvat koyrilærarin lærdi tey, at trýkantaða skeltið, sum stendur við vegkrossin, merkir.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | 17 |
| Halifax | 21 |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 16 |
| Lerwick | 17 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 22 |
| Tromsø | 20 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 28 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 28 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 27 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 30 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 26 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 28 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 981 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing eystan og grynnist nakað. Brúgvalagið haðani til Føroya fer eystureftir.




Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og dregur óstøðuga luft av útsynningi móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/07 kl. 06$^{00}$– 24/07 kl. 06$^{00}$. Hitin í gjár: 13,2°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 22,1°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 23/07 kl. 06$^{00}$–24/07 kl. 06$^{00}$
Avfallið higartil í juli: 66,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

29. juli: Tendring
5. aug.: Fyrra kvarter
6. aug.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. aug | 09.57 | 22.19 | 08.57 | 21.19 | 09.12 | 21.34 | 11.57 | — | 00.36 | 12.57 | 08.12 | 20.34 | 07.12 | 19.34 | 10.12 | 22.34 | 11.12 | 23.34 | 09.42 | 22.04 | 10.57 | 23.19 |
| 2. aug | 10.40 | 23.02 | 09.40 | 22.02 | 09.55 | 22.17 | 00.19 | 12.40 | 01.19 | 13.40 | 08.55 | 21.17 | 07.55 | 20.17 | 10.55 | 23.17 | 11.55 | — | 10.25 | 22.47 | 11.40 | — |
| 3. aug | 11.23 | 23.44 | 10.23 | 22.44 | 10.38 | 22.59 | 01.02 | 13.23 | 02.02 | 14.23 | 09.38 | 21.59 | 08.38 | 20.59 | 11.38 | 23.59 | 00.17 | 12.38 | 11.08 | 23.29 | 00.02 | 12.23 |
| 4. aug | — | 12.05 | 11.05 | 23.27 | 11.20 | 23.42 | 01.44 | 14.05 | 02.44 | 15.05 | 10.20 | 22.42 | 09.20 | 21.42 | — | 12.20 | 00.59 | 13.20 | 11.50 | — | 00.44 | 13.05 |

5 707265 100050 >